## Formansskifti í SuSvim

Formaðurin í Suðuroyar Svimjifelag, Reidar Simonsen, hevur lagt frá sær, og Marlon Kjærbo er nú nýggjur formaður í felagnum. Reidar, sum var ein av stovnarunum av Suðuroyar Svimjifelag á heysti 2007, hevur verið formaður hesi fyrstu tvey árini. Suðuroyarportalurin skrivar, at hann hevur lagt frá sær, tí ósemja er í nevndini um, hvussu grundleggjandi trupulleikar skulu loysast.



## U17-landsliðið í gongd

Í gjár savnaðu landsliðsvenjararnir, Geir Wardum og Birgir Sondum, fyri fyrstu ferð U17-landsliðið hjá kvinnum. Hetta eru kvinnur, føddar í 1992, 1993 og 1994. Hondbóltssambandið skipar úttøkuna soleiðis, at feløgini sjálv frítt kunnu velja út spælarar í deildini gentur 17, sum vera hildnar at vera nóg góðar til ungdómslandsliðið. Í næstum fara teir báðir venjararnir at seta seg í samband við feløgini.

### Kyndil-Neistin 20-37 (9-19):

# Neistin knústi Kyndil

**Hóast fráveru av fleiri profilum hevði Neistin ongar sum helst trupulleikar av Kyndli**




Jákup Mørk

Vónandi verður spenningurin størri, tá Kyndil og Neistin um tríggjar vikur hittast í steypafinaluni í manshondbólti.

Hesa ferð var spenningurin í øllum førum ikki tann stóri, og tann sum var, var burtur eftir bara tíggju minuttum.

Neistin mátti vera Heina Hanusarson, Áka Mørk, Birgir Poulsen og Finn Hansson fyriuttann, men hetta nervaði á ongan hátt avrikið. Kanska tvørtur ímóti. Felagið hevur helst breiðasta hópin av øllum, og fráveran av teimum fýra gav bara betri pláss til aðrar. Ikki minst David Edvardsen, sum nú spældi á bakkinum allan dystin, og Trónd Kragesteen, sum veruliga er um at finna rætta lagið aftur.

Í so máta gjørdi tað størri mun hjá Kyndli, at altíð stríðshugaði Bárður Johannesen mátti sita uttanfyri.

Tí stríðsvilji var at kalla eingin hjá Kyndli. Fyrsta korterið av dystinum gjørdist støðan næstan pínlig, tá málini skolaðu inn, uttan at teir grønu høvdu nakað aftursvar, og hóast teir fótaðu sær nakað, so var allur spenningur tikin úr dystinum.

Umframt stórtapið, so bar hetta eisini við sær, at Kyndil nú er niðasta liðið í deildini. Sjálvandi er munurin til eitt finalupláss bara eitt stig, og í so máta eru allir møguleikar framvegis opnir. Men spenta støðan undirstrikar eisini, hvussu spent støðan er hjá fleiri av síðvandu liðunum, sum nú eru í vanda fyri at flyta niður.



Tróndur Kragesteen slapp veruliga at royna seg á miðplássinum sunnudagin, og hann prógvaði, at hann er í fullari ferð við at finna rætta lagið aftur

Mynd: Álvur Haraldsen

### Stjørnan-Neistin 29-18 (11-5):

## Ferð á seinna hálvleiki

**Eftir at hava gingið í tómgongd fyrstu 30 minuttirnar, kom gongd á málskjotingina eftir steðgin, tá Stjørnan tók ímóti Neistanum**

Stjørnan helt fast um oddasessin, tá Neistin kom á vitjan sunnudagin.

Undan dystinum var Stjørnan favorittur, og teir vóru eisini á odda allan dystin á tamb sunnudagin.

Men tað var nú tann stóri gulldámurin á spælinum fyrra hálvleik. Ferðin var ikki nøkur serlig, og bara 16 mál í 30 minuttir siga eisini nakað um, at talan ikki var serliga málsøkið spæl hesa løtuna.

Neistin fekk bara fimm mál undan steðginum, og hetta broyttist ikki tað heilt stóra fyrstu løtuna eftir steðgin.

Tá hevði Stjørnan hinvegin tikið annað skinn um bak, og fyri at rudda seinasta ivan av vegnum, buldraðu tær avstøð alt fyri eitt.

Og so gjørdist talan hóast alt um ein hampuliga málríkan dyst. Men spenningur var tó ikki tað, sum áskoðararnir í Klaksvík fingu á degnum.

**mørk**

### StÍF-Tjaldur 21-29 (13-14):

# Brúktu ein hálvleik

**Tjaldur sýndi ikki tað stóra undan steðginum, men tá meistaraliðið eina løtu tók seg saman, varð allur ivi um úrslitið skúgvaður til viksa**

Tað hevur verið mest sum sama søgan, hvørja ferð StÍF og Tjaldur hava spælt seinnu árini. Eina góða løtu fylgir StÍF við, men onkra staðni kring steðgin skrædnar fullkomuliga.

Og soleiðis var eisini sunnudagin.

Fyrsta hálva tíman var nevnliga lítil og eingin munur á liðunum báðum. Eftir at Tjaldur legði bragdligari fyri, togaði StÍF seg aftur, og eitt skifti undan steðginum vóru tær enntá á odda.

Alt tað góða arbeiðið, sum varð lagt í fyrra hálvleik, varð tó tileinkisgjørt fyrstu løtuna av seinna hálvleiki. Tá sleit Tjaldur seg nevnliga fullkomuliga leyst, og áðrenn tær hjá StÍF veruliga varnaðust tða, var munurin øktur til eini sjey mál.

Og so gjørdi tað minni, at Tjaldur tók tað meira róligt restina av dystinum. Sigurin kom ongan tíð í vanda, og enn sum áður rennur Tjaldur kapp við Stjørnuna um oddasessin, sum ber við sær fyrimunin av heimavølli í næstu og eini møguligari triðju FM-finalu.

**mørk**



Í ein hálvan tíma slapp StÍF veruliga at spæla við, tá meistararnir vitjaðu

Mynd: Álvur Haraldsen